# Sørvingar eru meistarar

**Við einum tryggum 3-0 sigri á Fram í Hoyvíkshøllini sunnudagin tryggjaði SÍ sær føroyameistaraheitið í mansflogbólti 2005.**

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sørvingar hava í drúgva tíð bara gingið og bíðað eftir, at meistaraheitið kundi tryggjast, og sunnudagin var dagurin so komin, at SÍ við einum sigri móti Fram kundi rópa seg føroyameistarar í mansflogbólti 2005.



*Sunnudagin tryggjaði SÍ sær meira gull í ár, tá ið teir við einum sigri á Fram í Hoyvík tryggjaðu sær føroyameistaraheitið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Suverenir meistarar

Tað er einki at taka seg aftur í, at SÍ hevur verið nógv tað besta liðið í meistaradeildini hjá monnum í ár. Liðið hevur vunnið allar dystirnar, ið teir hava spælt síðani miðjan oktobur mánað, og tað sigur ikki so lítið um styrkina hjá liðnum.

Sunnudagin stóð Fram sum áðurnevnt fyri tørn, og her var eingin ivi um, hvat var tað betra liðið.

Sørvingar snøgt sagt sópaðu heimaliðið av vøllinum. Við sínum vanliga ágrýtna spælistíli langaðu teir ferð aftaná ferð bóltin í gólvið hjá mótstøðumonnunum, og hvussu stórur munurin á liðunum er, var sjónligt frá fyrsta bólti. Fyrsta settið gjørdist heldur ikki nakrantíð spennandi, tí SÍ var nógv betri og vann settið sannførandi 25-13.

Í næsta settinum kom ein feril av spenningi í. Heimaliðið Fram royndi at bíta eitt sindur frá sær, og sørvingarnir, sum kanska vóru ruraðir eitt sindur í svøvn av lætta sigrinum í fyrsta settinum, mótu líkasum taka seg eitt sindur saman, áðrenn tað at enda eydnaðist teimum vinna settið 25-21.

Í triðja settinum var eingin ivi. Sørvingar vildu bara hava meistaraheitið til høldar, og tað fingu teir við einum knúsandi 25-11 sigri í seinasta settinum, og so kundu bæði leikarar og áskoðarar fengast um, at tað í ár hevur eydnast SÍ at vinna greipuna í føroyskum mansflogbólti.

### Framúr ár

At menninir hjá SÍ vinna greipuna í ár er avbera flott, og tá ið havt verður í huga, at felagið fyllir 100 ár í ár, so man lítið verða at ivast í, at leiðslan í felagnum fegnast um føðingardagsgávuna, sum leikararnir og venjarin hava latið felagnum á 100-ára degnum.

Fyri lítlum mánað síðani tryggjaði SÍ sær sigurin í steypakappingini, tá ið teir í finaluni vóru ein alt ov stórur gloypibiti hjá Mjølnir, og tann dysturin vísti kanska allarbest, hvussu nógv betur enn hini liðini, ið nýklaktu føroyameistararnir úr SÍ eru.

### Mjølnir yvirtók silvurplássið

Ein annar dystur var í meistaradeildini hjá monnum um vikuskiftið. Hann var millum tey bæði liðini, ið stríðast um silvurheiðursmerkir. Tað eru Fleyr og Mjølnir, og hesi bæði lið hittust í Gundadalshøllini sunnudagin.

Undan dystinum var Fleyr eitt stig framman fyri Mjølnir á stigatalvuni, men aftaná dystin hevði Mjølnir vunnið silvurplássið frá Fleyr.

Sunnudagin vóru klaksvíkingarnir nógv betur enn havnarmenninir, og Mjølnir vann fult uppiborið dystin 3-0. Greiður munur var á liðunum báðum í øllum trimum settunum, og nú bendir alt á, at Fleyr noyðist at taka til takkar við bronsumerkjunum í ár.

Fram-SÍ 0-3 (13-25, 21-25, 11-25)
Fleyr-Mjølnir 0-3 (16-25, 14-25, 19-25)

# Mjølnir á gullkós

**Við einum ógvuliga týðandi sigri á Drátti á Giljanesi sunnudagin, tók Mjølnir eitt risafet á veg móti FM-gullinum**

## Flogbóltsstøður

**Meistaradeild, kvinnur**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Mjølnir | 17 | 14 | - | 3 | 44 | 15 | 29 | 19 |
| 2 | TB | 17 | 14 | - | 3 | 44 | 22 | 22 | 19 |
| 3 | Dráttur | 17 | 10 | - | 7 | 39 | 27 | 12 | 16 |
| 4 | ÍF | 17 | 7 | - | 10 | 27 | 32 | -5 | 10 |
| 5 | KÍF | 17 | 5 | - | 12 | 19 | 39 | -20 | 6 |
| 6 | SÍ | 17 | 1 | - | 16 | 11 | 49 | -38 | 2 |

**Meistaradeild, menn**

| | | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 14 | 13 | - | 1 | 40 | 9 | 31 | 19 |
| 2 | Mjølnir | 13 | 9 | - | 4 | 31 | 16 | 15 | 12 |
| 3 | Fleyr | 14 | 8 | - | 6 | 28 | 26 | 2 | 11 |
| 4 | ÍF | 13 | 3 | - | 10 | 14 | 33 | -19 | 5 |
| 5 | Fram | 14 | 1 | - | 13 | 11 | 40 | -29 | 1 |

FLOGBÓLTUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Lagt var upp til eitt ordans oddabrak á Giljanesi sunnudagin, tá ið kvinnurnar úr Mjølnir vóru og vitjaðu Drátt. Bæði liðini kundu við einum sigri taka eitt stórt fet móti FM-heitinum, og við tí viðráki, sum Dráttur hevur havt í seinastuni, var tað ikki sørt, at fleiri høvdu heimaliðið sum favoritt til at vinna dystin.

### Ikki so spennandi sum væntað

Tað er ikki so langt síðani, at hesi bæði lið dystaðust í Klaksvík, og tá var tað Dráttur, ið var omaná. Sunnudagin var tó vent í holuni, tí Mjølnir var betra liðið, og tað eydnaðist ongantíð Drátti av álvara at hótta klaksvíkskvinnurnar.

Í fyrsta settinum var tó spenningur, og settið var rættuliga javnt. Móti endanum hevði Mjølnir tó munin, og tær gjørdu sær dælt av nøkrum mistøkum hjá Drátti og tryggjaðu sær settið 25-23.

Heimaliðið tóktist rættuliga fjáltursstungið, og tað var rættuliga týðuligt, at spælararnir hjá Mjølnir hava drúgvari royndir við at spæla slíkar týðandi dystir, har eitt møguligt FM-heitið stendur upp á spæl.

Mjølnir var betra liðið, og tað prógvaðu tær eisini í næsta settinum, har tær vóru greitt omaná móti vertunum. Hóast tað ikki ljóðar av so nógvum, at tær vunnu settið 25-20, so var ongantíð nakar ivi um, at settið fór til Klaksvíkar, og sum heild tóktust tær hjá Mjølnir meiri klárar til avgerandi dystin.

Dráttur fótaði sær ongantíð, og dysturin fusaði eitt sindur út, og trúfasta áskoðarafjøldin hjá Drátti fór nakkalang til húsa aftur. Mjølnir vann seinasti settið 25-18, og harvið vunnu tær rættuliga trygt oddabrakið 3-0.

### Stóð nógv á hjá TB

Hitt oddaliðið TB var á Kambsdali og dystaðist við ÍF, og her stóð heilt nógv á hjá TB, áðrenn tað eydnaðist teimum at vinna dystin.

ÍF hevur av álvara fótað sær í seinastuni, og sunnudagin góvu tær veruliga TB ein skarpan gang. Fyrsta settið vann ÍF 25-20, og tað var um reppið, at tær eisini vunnu næsta settið. Men TB megnaði tó at vinna settið 25-23, og stóð á jøvnum 1-1.

Fleiri hildu kanska, at so var sloppið hjá TB, men ÍF var ikki soleiðis at koppa. Heimaliðið spældi upp til sítt besta, og tær vunnu uppiborið triðja settið greitt 25-19, og tí var setningurin hjá TB greiður. Tær skuldu fyrst vinna fjórða sett, áðrenn tær kundu vinna dystin við einum møguligum javnbrótara.

Og tað var júst tað, ið TB gjørdi. Tær vunnu fjórða settið 25-21, og í javnbrótaranum var eingin ivi. Tá fór luftin at ganga undan hjá heimaliðnum, og TB vann javnbrótaran 15-8, og harvið vunnu tær dystin 3-2.

**Dráttur-Mjølnir 0-3**
(23-25, 20-25, 18-25)
**ÍF-TB 2-3**
(25-20, 23-25, 25-19, 21-25, 8-15)